


Við sínum framúr dugnaligu tónleikarum bergtók Mezzaforte áhoyrarnar

# ÓLAVSØKUKONSERT

# eftir nýggjum leisti

**20. ólavsøkukonsertin er farin afturum, og hon varð óvanliga illa vitjað. Tað var keðiligt, tí tónleikurin var góður, bólkarnir framførdu væl, ljóðið sum heild var fínt og veðrið helt sær heilt til MC-Hár endaði konsertina, tá klokkan næstan var farin av fýra ólavsøkuaftansmorgun. Tá fór at sirma. So tit, sum settust aftur vegna veður, skrá ella whatever: tit hava forsømt tykkum.**

UMMÆLI

**Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð**
**Myndir: Álvur Haraldsen**

Staddur í kommunuskúlagarðinum eitt sindur í átta mátti eg spyrja meg sjálvan, um eg var komin í rættan garð. Ongin spurdi eftir atgongumerkinum, eg hevði havt um skøvningin á høgru hond í fleiri dagar, ongir áhoyrarar vóru, og menn gingu og riggaðu garðin til at hava tivoli í dagin eftir. Kanska væntaðu fyrireikararnir sær ikki áhoyrarar í ár? Ella var hetta kanska ein partur av konsertini? Eg var so har. Og saman við mær nøkur fá tandur, sum ivaleyst eisini vóru har í professionellum ørindum.

**Pop-Top vinnarin spældi fyri ongum**

Neyvan hevur tað verið megafeitt hjá Pop-Top vinnaranum, Ineptus, at trína á pallin sum teir fyrstu á konsertini. Men til teirra lukku var eg har, og eg fekk eitt merkiligt upplivilsi, tí bólkurin spældi væl, góðan tungan rokk, og sangarin og hinir í bólkinum rokkaðu og rullaðu sum var kommunuskúlagarðurin fullur av dansandi áhoyrarum. Eg vendi mær á fyri at hyggja, men garðurin var enn líka tómur. Tað løgdu teir líka í, tíbetur, og teir spældu av so fullum huga, at teir at enda máttu rekast av pallinum.

Fjúrtan bólkar spældu, og eg fari ikki at taka fram hvønn einstakan bólk her. Men eg vil taka fram ymiskt



MC-Hár hevði tveir stripparar við á pallin fyri at hátíðarhalda 15 ára føðingardagin